## Framsýningar

Skírisdag kunnu fólk í Kalsoynni fara til framsýningar í Mikladali og á Húsum. Tann dagin skipa Húsar/Syðradals Kvølsskúli og Klaksvíkar Kvøldskúli fyri áhugaverduum framsýningum av hondarbeiði og tøving, sum er komið burturúr í kvøldskúlanum í vetur. Norðlýsið skrivar, at áhugin fyri tilboðunum hjá kvøldskúlunum hevur verið veksandi í øllum bygdunum í Kalsoynni. Framsýningin skírisdag verður frá kl. 14 til kl 19.

## Nógv at fáa

Í gjár byrjaði veiðitíðin hjá stuttleikaveiðimonnunum, sum royna við tráðu í teimum íslendsku áunum. Morgunblaðið skrivar, at væl kom burturúr tann fyrsta dagin. Eitt nú vóru 89 fiskar veiddir í einari á, og í fleiri øðrum áum fingu menn væl burturúr. Í fleiri áum á Vesturlandinum kom hinvegin lítið burturúr í gjár, tí har hevur tað regnað so mikið í seinastuni, at áirnar vóru í so stórar. Umframt í áunum kunnu fólk eisini veiða á nøkrum vøtnum.

Ungt par á Argjum steðgað í sethúsabygging:

# Hava fingið eina millión í klemmu

**Heðin Mortensen, borgarstjóri, hevur persónliga givið boð um at afturkalla eitt byggiloyvi, ið annars varð útskrivað av kommununi fáar mánaðir framman-undan. Kommunan eigur sjálv feilin í málinum, men hevur kortini blandað seg í eina grannaósemju við tí úrsliti, at húsini standa í hálvum gekki, meðan ein millión krónur hanga í leysum lofti**



*Arngerð Diana og Jan kunnu bara hyggja langt eftir húsunum, sum tey við góðum treysti fóru undir at byggja fyri góðum tveimum mánaðum síðani*

*Mynd: Jens-Kr. Vang*

BYGGIMÁL
*Leo Poulsen*
leo@sosialurin.fo

Tey vóru bæði fegin og spent, Arngerð Diana Hansen og Jan Joensen.

Skjótt skuldu tey seta føtur undir egið borð. Grundstykkið hevði Arngerð fingið frá móðir síni, og fyrst í september í fjør veitti kommunan teimum byggiloyvi. So tað var við góðum treysti, at stykkið beinanvegin varð planerað, og síðani til tað, sum var enn meiri spennandi: At fara út at biða um tilboð upp á húsini.

Um miðan januar var alt so klárt. Tikið var av einum tilboði, og tað sum var enn meiri hugaligt, var, at teimum hevði eydnast at fingið handverkarar at byggja húsini. Og tað er annars ikki bara sum at siga tað í hesum døgum, nú øll vinnan hevur fullar hendur – bókstaviliga sagt.

Men tey bæði skuldu skjótt sanna, at trøini vaksa ikki inn í himmalin. Tí nú stakk seg knappliga upp ein trupulleiki, ið teimum als ikki so mikið sum var komin til hugs frammanundan.

### »Stríðs«-gøta

Heilt síðani foreldur Arngerðs bygdu síni hús í 1971, hevur ein rímiliga breið gøta verið nýtt sum atgonguvegur til ognina. Nakar veruligur góðkendur vegur hevur ongatíð verið har.

Hetta hevur tó ongatíð verið ein trupulleiki, og øll húsini í grannalagnum hava nýtt nevndu gøtu sum atgonguveg alla ta tíð, húsini hava staðið har.

Oman móti almenna vegnum er tó veruligur vegur, men hesin er privatur og ogn hjá trimum húskjum. Og eftir at grundin til omanfyri nevndu hús varð stoypt vísir tað seg, at hin eini av hesum ánarunum av vegastubbanum hevur kært til kommununa, til tess at fáa steðga byggingini við teirri grundgeving, at tey ikki vildu hava økta og tunga ferðslu á vegnum.

Nú er tað at siga, at ferðslan ikki er økt av byggingini á annan hátt, enn at onkur hissini lastbilur hevur koyrt eftir vegnum at veita tilfar til húsini. Arngerð og Jan búðu framman undan í íbúð í kjallaranum hjá móðir Arngerð, og um tey bæði so búgva í egnum húsum ella í íbúð, ávirkar tað jú ikki ferðsluna.

### Heðin upp í leikin

Unga parið var ovfarið, tí tey høvdu ongatíð ímynda sær, at hetta kundi gerast ein trupulleiki. Tað vanliga var jú annars, at øll har um vegir nýttu smølu gøtuna til parkeringspláss fyri bæði bilum og bátum.

Sjálvsagt kundi tað vera eitt sindur óheppi, at betongbilarnir stóðu á vegnum og fyltu í formarnar, tá grundin varð stoypt, men hetta snúði seg hóast alt bert um hálvanannan dag.

Líkamikið, kært bleiv, og fyrisitingin í kommununi royndi síðani at fáa tey bæði sjálvboðið at steðga byggingini. Men tað sigur seg sjálvt, at eingin leingir við vilja um byggingina, tí fyri tað fyrsta kann hetta væl dýrka byggingini, og fyri tað næsta mátti roknast við, at handverkararnir fóru aðrastaðir at arbeiða – teir seta seg jú ikki hendur í favn at bíða, tá ovmikið er at gera.

Málið var tó eftir øllum at døma so álvarsligt, at tað var fyri á býráðsfundi, og eftir henda fund fingu Arngerð og Jan at vita, at tey sluppu at halda fram við byggingini.

Men dagin eftir gevur Heðin Mortensen, borgarstjóri so umsitingini boð um, at afturkalla byggiloyvi, og tekur stig til at seta fútabann móti víðari bygging.

Av sonnum ein løgin gerð av borgarstjóranum.

### Kommunan feilin

Hesi ungu eru tískil steðgað í byggingini av sínum sethúsum, sum nú bert standa har í hálvum gekki – og húsa starum!

Tað er eyðvitað, at kommunan stendur við ábyrgdini, bæði so og so. Tí sambært matrikuleringslógini, skal kommunan tryggja sær í sambandi vi frámatrikuleringing av grundøki, at alt fer rætt fram. Í hesum føri hevur kommunan eyðsýniliga ikki gjørt sína skyldu, júst tí eingin atkomuvegur er til grundstykkið - júst ein av orsøkunum til, at kommunan skal vera við í eini frámatrikulering.

Í øðrum lagi hevur kommunan útskrivað eitt byggiloyvi uttan at tryggja sær, at alt er í lagi. Kommunan kann undir ongum umstøðum leggja út á borgaran at halda skil á, um treytirnar fyri at byggja eru uppfyltar. Tí var næsti feilurin gjørdur, tá byggiloyvið varð útskrivað.

Og nú hevur borgarstjórin so sjálvur gjørt triðja feilin við at taka støðu í einum privatum máli millum tveir borgarar. Eitt mál, sum leggur einum ungum pari fótonglar í vegin at seta fót undir egið borð, men sum tó ikki í síðsta enda neyvan fer at kosta teimum pening. Ta ábyrgdina eigur kommunan nevniliga.

Heðin Mortensen, borgarstjóri:

## Ein loysn finnast innan fáar dagar

**- Eg arbeiði við málinum, og eg rokni heilt vist við, at ein loysn kann finnast innan heilt fáar dagar, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.**

BYGGIMÁL
*Leo Poulsen*
leo@sosialurin.fo



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, ætlar, at málið skal fáa eina loysn innan fáar dagar*

Tá Sosialurin tosaði við Heðin Mortensen, borgarstjóra, fyrrapartin í dag, lovaði hann at taka sær av málinum beinanvegin.

Trupulleikin er ikki ókendur við ymiskum skavankum í sambandi byggiumsiting á Argjum, og hetta er enn eitt mál, har ikki øll viðurskifti eru í lagi.

Heðin Mortensen setti seg beinanvegin inn í málið, tá vit tosaðu við hann, og hann segði seg kunna lova, at málið finnur eina loysn innan fáar dagar.

Talan er sum so um klandur millum grannar, har eini parturin ikki er áhugaður í at tosa um trupulleikarnar, men borgarstjórin hevur givið umsitingini boð um at fáa viðurskiftini í rættlag.

Eg blandi meg ikki vanliga í slík mál, men her er talan um eina kæru frá einum borgara, og hóast tað er ein feilur frá umsitingini, so er tað er sum borgarstjóri, ið standi við endaligu ábyrgdini. Tí valdi eg at steðga byggingini til viðurskiftini eru komin í rættlag, sigur Heðin Mortensen.

Og borgarstjórin hevur sum nevnt góðar vónir um at fáa greiði á málinum heilt skjótt. Innan fáar dagar, sum hann sjálvur málber seg.